## Ritan í minking

Ritan minkar í bjørgunum í Føroyum. Tað er eisini galdandi fyri bjørgini í flestu Norðurhøvum, og seinastu fýra árini hava verið serstakliga ring. Orsøkin er helst, at hevur verið ov lítið til av nebbasild. Hetta boðar Fiskirannsóknarstovan frá. Síðani 1988 er á hvørjum ári talt, hvussu nógvir rituungar í miðal komu undan fyri hvørt reiður í Høvdanum í Skúgvi. Hesi úrslit vísa at árini eru sera misjøvn. Bara 55 % av ritupørunum fáa ein unga á hvørjum ári, og tað er ov lítið til at halda stovninum í javnvág. Men ein partur av teimum pisunum, sum blivu floygdar tey góðu árini 1999-2002, eru uppi í búfuglastovninum nú. Tað gevur vón um, at ritustovnurin kann menna seg aftur, sigur Fiskirannsóknarstovan.



## Dansa 13. kvøld

Dansifelagið Tøkum Lætt skipar 5. januar fyri 13. kvølds dansi í Sjónleikarahúsinum í Havn. Í stuttum skrivi boðar nevndin í Tøkum Lætt frá, at tey hava bæði gólv og pall, so pláss er bæði fyri at dansa og at hvíla beinini, sum tey taka til. 13. er 6. januar, sum er ein sunnudag. So fyri at fáa dansin at fella á leygarkvøld, verður dansurin altso 5.

# Almennur stuðul einans til kristiligt virksemi




**Ein sosialdemokratiskur flokkur við eini sterkari religiøsari dimensjón. Tað var niðurstøðan, tá Miðflokkurin sum fyrsti flokkurin legði fram sína valskrá fyri komandi løgtingsval. Mest hugvekjandi var støða Miðfloksins um, at almennur stuðul til mentan og list einans skal latast til kristiligt virksemi**

LØGTINGSVALIÐ
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

So legði fyrsti politiski flokkurin fram sína valskrá til løgtingsvalið tann 19. januar á parnassinum á Hafnia í morgun (hósmorgun). Ein fundur, sum var alt ov drúgvur fyri okkum, sum hava evstamark sama fyrrapart, og sum hinir flokkarnir vónandi taka hædd fyri á komandi tíðindafundum.

Við 17 punktum gjøgnumgekk formaðurin Jenis av Rana tey mál, sum Miðflokkurin ynskir at arbeiða fyri í komandi valskeiði. Og flokkurin kann framvegis lýsast sum ein sosialdemokratiskur flokkur við eini sterkari religiøsari dimensjón.

### Humanistiskar hóttanir

*»At bera tað merki, sum eyðkennir verkið, ið varðveitir Føroyar, mítt land«.*

Við hesum slagorðinum á stórskiggja markeraði Miðflokkurin, at høvuðsendamálið framvegis er at *»verja absoluttu virðini á kristna grundstøðinum«*, sum tað stendur at lesa undir punktinum »Tjóðarfrælsi«.

-Humanisman setir menniskjuna í hásætið, men kristindómurin setur skaparan í hásætið. Miðflokkurin fer framhaldandi at berjast ímóti humanistisku lívsáskoðanini, segði Jenis av Rana. Formaðurin ávaraði ímóti tí ávirkan, sum kemur uttanífrá, og sum í fremsta punktinum í valskránni kemur til sjóndar, tá Miðflokkurin skrivar, at alheimsgerðin má ganga báðar vegir.

- Vit taka ímóti øllum, sum kemur uttanífrá, og avnokta samstundis okkara egna ríka arv. Tað er sum at síggja ein hund, sum legst fyri øllum, sum kemur framvið. Miðflokkurin trýr á egin virði og egið grundarlag, segði Jenis av Rana.

Sami boðskapurin kom til sjóndar í sambandi við rúsdrekkalógina, har tað stendur at lesa, at *»núverandi liberaliseringskós má vendast«*.

- At Smyril fekk skeinkiloyvi, og at tað nú er loyvt at skeinkja uttandura í ávísum støðum, er enn eitt dømi um, at tað er brúk fyri einum flokki sum Miðflokkinum.




*- Stuðul til mentan og list skal einans latast til virksemi, sum byggir á eitt kristiligt grundarlag, segði Bill Justinussen, tá Miðflokkurin í morgun legði fram sína valskrá fyri løgtingsvalið. Her situr Bill undir liðini á partamanninum Karsten Hansen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Kristiligt tjóðarfrælsi

Miðflokkurin er framvegis ein loysingarflokkur, men Jenis av Rana legði dent á, at hansara fullveldisverkætlan ikki er tann sama sum hon hjá Tjóðveldi.

- Okkara tjóðarfrælsi byggir á føroyska grund, meðan Tjóðveldi í alsamt størri mun byggir á eitt danskt virðisgrundarlag, sum undirgrevur tann kristna siðaarvin, segði Jenis av Rana.

Um hetta í praksis merkir, at hesir báðir flokkarnir ikki longur kunnu samstarva um fullveldisspurningin, soleiðis sum flokkarnir áður hava gjørt, kom Jenis av Rana ikki nærri inn á. Men at formaður Miðfloksins tók sær stundir at taka frástøðu frá Tjóðveldi, er enn eitt dømi um, at tónin millum flokkarnar er harðnaður. Um Tjóðveldi aftur skal í samgongu, er ikki ósannlíkt, at flokkurin fær brúk fyri teimum tveimum ella trimum mandatunum hjá Miðflokkinum, og tí verður áhugavert at síggja, hvussu viðurskiftini millum hesar flokkar fer at laga seg.

### Almennur peningur til kristiligt virksemi

Miðflokkurin leggur undir punktinum »Mentan og frítíð« dent á, at almennur peningur í samband við stuðul til mentan og list einans skal latast til virksemi, sum byggir á kristna grund.

- Hvat fólk finna uppá privat, kann politiski myndugleikin ikki gera so nógv við, men tá vit fara eftir skattaborgarans peningi, skal peningurin sjálvsagt nýtast til virksemi, sum føroyingurin kann taka undir við. Tí hevur Miðflokkurin eitt greitt mál um, at stuðul til mentan og list skal byggja á nøkur krøv, sum liva upp til og samsvara okkara kristna grundstøði, segði tinglimur Miðfloksins Bill Justinussen undir tíðindafundinum.

Ein mentanarpolitikkur, sum sambært Bill Justinussen merkir, at ein bókaútgáva sum hon hjá Hans Andrias Sølvará, »Guds orð ella orð um Gud«, ikki skal fáa almennan stuðul.

### Sosiali profilurin

Umframt sjónligu átrúnaðarligu dimensjónina er valskráin hjá Miðflokkinum eyðkend av einum sterkum sosialum profili. Millum tey seytjan punktini, sum flokkurin í morgun legði fram, fekk almannapolitikkur, heilsupolitikkur og familjupolitikkur stórt rúm, og flokkurin ynskir aftur at skipa familjupolitikk undir egið málsøki.

Samanumtikið heldur flokkurin fram í tí kós, sum áður hevur eyðkent Miðflokkin, og sum byggir á eina kombinatión av einum sosialum profili við eini sterkari religiøsari dimensjón.